# Gongdin í málinum um Norðoyatunnilin

**Fyrrapartin týsdagin sendi Vinnumálaráðið Sosialinum sína útgávu av gongdini í málinum um Norðoyatunnilin, eftir at Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, hevði lagt Vinnumálaráðið undir at bera seg ov seint at.**

Gongdin í málinum um keyp av lendi til veg frá ætlaða rundkoyring yvir í Oyravegin (Norðoyartunnilin):

**30. september 2002:**
Karsten Hansen leggur fram uppskot til fíggjarlóg fyri 2003.

**22. oktober 2002:**
Landsverkfrøðingurin heitir á Vinnumálaráðið um at seta pening av til keyp av lendi til Oyravegin.

**14. november 2002:**
Vinnumálaráði heitir á Fíggjarmálastýrið um at seta pening til vegagerðina á uppskotið til eykajáttanarlóg fyri november.

**29. november 2002:**
Karsten Hansen leggur fram uppskot til eykajáttanarlóg fyri november í Løgtinginum. Umbønin um keyp av lendi við.

**17. desember 2002:**
Landsverkfrøðingurin sendir teldupost til Vinnumálaráðið (NW), við ynski um, at m.a. peningurin til keyp av lendi verður endurjáttaður á fíggjarlógini fyri 2003, um so er, at eykajáttan ikki verður veitt ella at tíð ikki verður til at avgreiða handilin í 2002. Ikki stundir at fáa Fíggjalógina 2003 broytta, áðrenn hon varð samtykt dagin eftir – 18.des.

**19. desember 2002:**
Eykajáttanarlóg fyri november samtykt við 3. viðgerð.

**20. desember 2002:**
Eykajáttanarlógin verður lýst, og kemur í gildi dagin eftir.

**31. desember 2002:**
Seinasti kjansur hjá Landsverkfrøðingurin at gera avtalu um keyp av lendi, eydnaðist ikki, játtanin datt burtur.

**27. februar 2003:**
Vinnumálaráðið sendir Fíggjarmálaráðnum sítt endaliga íkast til eykajáttanarlógina fyri mars 2003 um m.a. at fáa nýggja játtan til keyp av lendi í samb. við tunnilsgerðina. Umbønin helst útreiðsluneutral, tí uppskot eisini var um at selja Ternuna 1 fyri 0,3 mio.

**4. mars 2003:**
Karsten Hansen leggur fram uppskot til eykajáttanarlóg fyri mars. Vinnumálaráðið kann staðfesta, at ynskið hjá Vinnumálaráðnum um pening til keyp av lendi ikki er tikið við í uppskotið, sum verður lagt fram.

**9. juni 2003:**
sendir Vinnumálaráðið aftur Fíggjarmálaráðnum uppskot til eykajáttan, hesaferð fyri august 2003, har m.a. aftur verður biðið um játtan at keypa lendi til vegagerðina frá ætlaðu rundkoyringini yvir í Oyravegin.

**NB:**
Landsverkfrøðingurin hevði frá 21. til 30. desember til at avgreiða keyp av lendi, og tað eydnaðist ikki. Roynt varð at fáa peningin endurjáttaðan í fyrstu eykajáttanini (mars 2003), men Fíggjarmálaráðið valdi ikki at taka umbønina við í framlagdu eykajáttanina.

Bjarni Djurholm:

# Karsten Hansen ber ósannindi



*– Karsten Hansen hevur borið ósannindi og koyrt skuldina yvir á ósekar persónar í sambandi við vantandi peningin í verkætlanini at gera Norðoyatunnilin, sigur Bjarni Djurholm*

**Í Sosialinum leygardagin skuldsetti fíggjarmálaráðharrin Karsten Hansen landsverkfrøðingin og Vinnumálaráðið fyri at hava borið seg ov seint at í sambandi við umbøn til eykajáttan til verkætlanina við Norðoyatunnlinum. – Karsten ber beinleiðis ósannindi, sigur Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri**

NORÐOYATUNNILIN
*Heini í Skorini*

Nakað av stríði hevur staðist í gongdini við ognan av privata lendinum í Klaksvík, har vegagerð skal gerast í næstum frá komandi tunnilsmunnanum til landsvegin.

Karsten Hansen, fíggarmálaráðharri, segði leygardagin í Sosialinum, at privateigararnir eftir røttum langt síðani skuldu fingið boð frá landsverkfrøðinginum gjøgnum brøv, umframt at umbøn til eykajáttan frá Vinnumálaráðnum til Norðoyatunnilin kom sera seint.

## Beinleiðis ósannindi

Hesum vísir vinnumálaráðharrin, Bjarni Djurholm, aftur.

– Karsten skuldi sópað fyri egnum dyr fyrst, tí tað er ongum øðrum enn honum sjálvum at takka fyri, at peningur enn ikki er tøkur til keyp ella ognartøku av jørðini í Klaksvík í sambandi við Norðoyatunnilin.

Bjarni Djurholm vísir á, at Vinnumálaráðið langt síðani hevur vent sær til Fíggjarmálaráðið, og eykajáttanin, sum í løtuni verður bíðað eftir, er triðja umbønin frá Djurholm og co.

## Játtanin fall burtur

Bjarni Djurholm vísir á, at Fíggjarmálaráðið ikki tóktist arbeiða serliga álvarsamt við umbøn teirra um eykajáttan til keyp av lendi til vegagerð.

– 22. oktober 2002 søktu vit um pening at útvega jørð til vegagerð í Klaksvík, men tá eingin peningur var játtaður, og tá tað leið út ímóti ársskiftið og nýtt fíggjarár byrjaði, eydnaðist ikki landsverkfrøðinginum at gera avtalu um keyp av lendi, tí peningurin ikki var á fíggjarlógini 2003. Tískil fall játtanin burtur, vísir Bjarni Djurholm á. Hann leggur afturat, at talan bert var um umleið 200.000 krónur samanborið við samlaðu verkætlanina á 3-400 mió. krónur.

## Enn ein noktan

Í nýggja árinum fór Vinnumálaráðið aftur undir at útvega neyðuga peningin til ognan av jørð í Klaksvík, so Landsverkfrøðingurin kundi fara í holt við keyp ella ognartøku av jørðini umframt at upplýsa privateigararnar við brøvum.

Seint í februar varð næsta umbøn í Fíggjarmálaráðnum, og við tað at gamla Ternan var sett á sølulistan fyri nakað niðanfyri eini hálvari millión, var talan ikki um stórvegis útreiðslur, Vinnumálaráðið bað um.

– Men 4. mars legði Karsten Hansen fram uppskot um eykajáttanarlóg, og peningurin til Norðoyatunnilin varð ikki tikin við, sum landsverkfrøðingurin so harðliga hevði brúk fyri til ognan av lendinum í Klaksvík.

## Karsten skuldina

Hetta er frágreiðing og aftursvar Bjarna Djurholms til seinkanina við arbeiðinum at gera fast samband tvørtur um Leirvíksfjørð, og í løtuni verður bíðað eftir, hvussu triðja umbønin frá Vinnumálaráðnum verður móttikin í Fíggjarmálaráðnum.

– Beint áðrenn summarfrítíðina søktu vit so fyri triðju ferð um pening til Norðoyatunnnilin fyri august 2003, og vónandi fáa vit hesaferð peningin til vegagerðina frá ætlaðu rundkoyringini og til Oyravegin.

Bjarni Djurholm vísir á, at við útsøgnum Karsten Hansens í Sosialinum leygardagin eru beinleiðis ósannindi borin fram við upplýsingum, sum als ikki samsvara veruleikanum í hesum máli.

– Tað er ógvuliga harmiligt, at ein landsstýrismaður á slíkan hátt vaskar sær um hendurnar og koyrir skuldina yvir á landsverkfrøðingin og Vinnumálaráðið, og sjálvsagt kunnu vit ikki lata tað fara aftur við borðinum, eru seinastu orðini hjá einum bersøgnum Bjarna Djurholm um framferðarháttin hjá Karsteni Hansen, fíggjarmálaráðharra.



# Væntandi verða enn fleiri virkir bygd á havnalagnum á Toftum

**Við eini skattainntøku í 2002, sum var stívliga 27 milljónir krónur, ongum láni og ongari langfreistaðari skuld, er Nes kommuna fíggjarliga ein ógvuliga væl koyrandi kommuna**

KOMMUNUMÁL
*Vilmund Jacobsen*



*Vinnuliga menningin í Nes kommunu hevur verið ógvuliga stór seinastu árini. Einki bendir á, at hon er steðgað, tí framvegis er stórur áhugi at byggja nýggj virkir á havnalagnum*

*Savnsmynd*

Fólkatalið vaks við 27 í 2002, úr 1170 upp í 1197. 17 børn vórðu født, 9 fólk doyðu. 77 fluttu til kommununa, og 58 fluttu úr kommununi.

Hetta var gongdin í fólkatalinum í Nes kommunu í 2002.

Vøksturin í fólkatalinum hevur ført við sær, at næstan eingi hús standa tóm í kommununi í dag.

Nýggj hús eru bygd, og onnur standa í gerð.

## Eftirspurningur

Í frágreiðingini fyri árið 2002, sigur Nes kommuna, at eftirspurningurin eftir grundøkjum er veksandi, og at kommunan liggur inni við fleiri umsóknum um grundøkir í nýggju útstykkingini millum Kvíggjarheygg og Gadd. Vegaføringin er liðug og nú kloakk, vatn og annað er liðugt nakað inn um húsini uppi í Forna, verða grundøkini frá Gadd og norðureftir nú klár hjá fólki at ogna sær.

Byggiøkið millum Kvíggjarheygg og Gadd er einasta byggiøki, sum kommunan kann vísa á í løtuni.

Arbeitt verður við nýggjum útstykkingum, og arbeitt verður eisini við eini býarætlan fyri alla kommununa, sum væntandi verður liðug einaferð seint í hesum árinum.

## Virkir og skip

Bygdaráðið í Nes kommunu fegnast um, at virkini, sum eftirhondini eru mong í tali, høvdu eitt gott ár í 2002, tó at partafelagsskatturin ikki er øktur. Hetta hevur givið arbeiðsfólkunum á landi støðugari arbeiði og økta inntøku. Sama er at siga um sjófólkið, sum býr í kommununi, ið eisini hevði eitt gott ár í 2002. Útróðurin hevur eydnast væl og allir egningaskúrarnir, sum kommunan eigur, eru útleigaðir.

Saman við øðrum arbeiðsplássum, sum eisini eru í kommununi, eru virkini og skipini fíggjarliga grundarlagið undir rakstrinum.

Nes kommuna veit eisini at siga, at áhugin at byggja nýggj virkir framvegis er stórur, og kommunan hevur viðgjørt umsóknir um enn fleiri virkir á havnalagnum.

## Alt asfalterað

Hóast rættiliga nógv planeringsarbeiði og byggivirksemi hevur verið á havnalagnum á Toftum seinastu árini, hevur eydnast at fáa alt havnaøkið asfalterað.

Arbeitt verður nú við at uppmerkja og skipa ferðsluna á økinum.

# Skúli, dagrøkt og eldrarøkt

KOMMUNUMÁL
*Vilmund Jacobsen*



*Tørvurin á røktarplássum til gomul og veik økist nógv.*
*Eldrasambýlið í Nes kommunu, sum fer at rúma 16 fólkum, stendur væntandi liðugt fyrsta ársfjórðing komandi ár*

Fyri góðum 10 árum síðan hevði Nes kommuna ítøkiligar ætlanir um, hvussu skúlin skuldi útbyggjast. Tá førdi samfelagskreppan, sum legði at kalla alt samfelagið lamið, til, at útbyggingarætlaninar fyribils vórðu lagdar á hillina.

Bygdaráðið arbeiðir nú aftur við at fyrireika skúlaútbygging, sum mett verður at verða alneyðug.

Síðan 1999 hevur kommunan sett pening av á fíggjarætlanini til hesa útbygging, og í dag standa slakar 12 milj. krónur á bók, sum skulu nýtast til hetta endamál.

Tofta skúli hevur næmingar úr 1. flokki upp í 10. flokk, og samlaða næmingatalið liggur um stívliga 200.

## Dagrøkt

Eftirspurningurin eftir plássum í dagrøktini í Nes kommunu øktist í 2002.

Dagstovnurin á Svangaskarði rúmar nú spælistovu hjá dagrøktini, frítíðarskúla til 25 børn og útibarnagarði til 25 børn.

Talið av børnum, sum verða ansað, er stívliga 100, men nú tørvurin framvegis økist, er væntandi, at ansingin verður uppnormerað.

## Eldrarøkt

Eins og í øðrum kommunum, økist tørvurin á røktarplássum til tey gomlu og veiku nógv.

Saman við øðrum kommunum í oynni, eigur Nes kommuna Eysturoyar Røktar- og Ellisheim í Runavík og Umlættingarheimið í Gøtu.

Í løtuni er Nes kommuna í holt við at byggja eitt eldrasambýli til 16 búfólk, sum væntandi stendur liðugt fyrsta ársfjórðing komandi ár.

# 18,5 milj. krónur á bók

KOMMUNUMÁL
*Vilmund Jacobsen*

Í aðrari grein á hesi síðuni verður víst á, at skattainntøkan hjá Nes kommunu í 2002 var stívliga 27 milj. krónur. Hetta eru 2 milj. krónur meira, enn roknað varð við, tá ið árið byrjaði.

Skattaprosentið hetta árið var 19,9 eins og árið fyri, og tá ið partafelagsskatturin ikki øktist, er greitt, at øktu inntøkurnar í fyrsta lagi stava frá eini øking í skattainntøkuni hjá borgarunum.

Nes kommuna átti við árslok 2002 18,5 milj. krónur á bók. Talið við ársbyrjan var 11,99 milj. krónur.

Samanumtikið kann sigast, at fíggjarliga orkan hjá kommununi hevur verið brúkt til útstykkingar, eldraøkið, fríðkan og havnalagið. Somuleiðis er peningur settur av til skúlabygging og vetrarfríðing.